# Bygdarfólk ofrast fyri løtuvinning í Havn

**– Tað eru bara í Havn at tey gremja seg um trot á handverkarum, men samstundis royna tey av øllum alvi at forða handverkarum av bygd at koma til Havnar at arbeiða, sigur stjórin á El-Service á Skála**



*– Tað kann ikki vera rætt at handverkarar á bygd skulu missa møguleikan at sleppa uttanlands at arbeiða , bara fyri at byggifeløg og handverksmeistarar í Havn skulu fáa ein løtuvinning, heldur John Eli Olsen, stjóri á El-Service á Skála*

HANDVERKARA-TROT
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– At tað er stórt trot á handverkarum í Havn, skilji eg væl. Men har sleppur heldur ongin annar framat.

John Eli Olsen, stjóri á El- Service á Skála, er alt annað enn samdur, tá ið handverksmeistarar og Vinnuhúsið rópa neyðarróp, tí tað er so ringt at fáa handverkarar.

Í Sosialinum í gjár søgdu bæði Vinnuhúsið og handverksmeistarar, at tað er so stórt trot á handverkarum, at tað fer at gera bíðitíðina eftir at fáa nakað gjørt, munandi longri, samstundis sum tað fer at vera nógv dýrari at byggja hús.

– Øll, sum gremja seg um trot á handverkarum eru fólk, sum hava fyritøkur í Havn, sigur John Eli Olsen.

– Men samstundis mugu vit staðfesta, at meistarar og handverkarar á bygd sleppa ikki framat at arbeiða í Havn.

Hann sipar til, at tað eru ómetaliga fá arbeiði í Havnini, sum verða bjóðað út.

– Og tey arbeiði, sum Tórshavnar Kommuna bjóðar út, bjóðar hon bara út til handverksmeistarar í Havn, so har sleppa bygdafólk ikki uppí.

Hann sigur, at tað er bara at hyggja í bløðini, so gongur sjón fyri søgn, at arbeiði í Havnini verða ikki bjóðað út, ella tey verða bjóðað soleiðis út, at bara meistarar í Havn sleppa at bjóða.

Hann leggur afturat, at tað er vanligt, at kommunur bjóða síni arbeiði út innanfyri kommunumark fyri at fáa skattakrónur inn aftur.

– Men at tað er stórt trot á handverkarum í Havn, skilji eg væl, tí tað er bara har, at nakað virksemið er, sigur John Eli Olsen.

Annars heldur hann, at tað er løgið, at byggifeløg í Havnini bjóðað upp á ymisk arbeiði, uttan at hava fólk til at gera tað.

– Tað høvdu vit ikki gjørt. Hava vit ikki fólk at gera eitt arbeiði, bjóða vit heldur ikki upp á tað.

Hann vísir annrs ár, at støðan úti á bygd kann als ikki metast við støðuna í Havn, tí kring landið er als ikki so nógv virksemi.

– Tosa vit um stór elarbeiði hesa seinastu tíðina, er tað bara Hovstunnilin, Norðoyatunnilin, skúlin á Toftum, og kanska okkurt afturat, sum er bjóðað út.

– Annars er alt virksemi í Havnini og har verður alt arbeiði hildið innanfyri ein stongdan ring, so at bara byggifeløg og handverksmeistarar í Havn sleppa framat.

– Tað stóra trotið, ið summi kæra seg um, er sostatt ein havnartrupulleiki burturav, leggur hann afturat.

> ” *Øll, sum gremja seg um trot á handverkarum eru fólk, sum hava fyritøkur í Havn. Men samstundis mugu vit staðfesta, at meistarar og handverkarar á bygd sleppa ikki framat at arbeiða í Havn.*

### Tvinga bygdarmenn til Havnar

Men John Eli Olsen sigur, at samstundis gera arbeiðstakarar í Havn, alt teir kunnu, fyri at forða handverkarum á bygd at koma til Havnar at arbeiða- uttan so at teir arbeiða hjá onkrum meistara í Havn.

Sostatt verður neyðugt hjá handverkarum á bygd at finna aðrar møguleikar og ein av hesum møguleikum er at fara uttanlands at arbeiða.

– Men tað, sum hendir nú, er, at byggifeløg og handverksmeistarar í Havn royna at leggja trýst á politikarar í eini roynd at fáa teir at forða handverkarum at fara uttanlands at arbeiða.

– Endamálið við tí er at royna at tvinga handverkarar á bygd til Havnar at arbeiða. Men tað skal verða so, at teir skulu arbeiða hjá byggifeløgum og handverksmeistarum í Havn, tí byggifeløg og meistarar á bygd sleppa ikki upp í part.

– Sostatt skal møguleikin hjá handverkarum á bygd at fara uttanlands at arbeiða, forkomast fyri løtuvinning hjá byggifeløgum og handverksmeistarum í Havnini, sum hava bjóðað upp á arbeiði, sum teir í veruleikanum ikki hava fólk til, sigur stjórin í El-Service.

> ” *Tað er løgið, at byggifeløg í Havnini bjóðað upp á ymisk arbeiði, uttan at hava fólk til at gera tað*

Hann sigur, at tá ið arbeiði verða boðin út, tekur El-Service seg ofta í samstarv við onnur, so at tey kunnu bjóða saman upp á eitt arbeiði.

> ” *– Tað stóra trotið á handverkarum er ein havnartrupulleiki burturav, men handverkarar á bygd noyðast av landinum fyri at fáa arbeiði*

– Byggifeløg og handverksmeistarar í Havn brúka ikki tað at fara í samstarv við onnur, so at tey kunnu bjóða saman upp á eitt arbeiði.

– Teir bjóða sjálvi og royna so at taka fólk frá øðrum fyritøkum, ella tey royna at forkoma møguleikanum hjá handerkarum at arbeiða uttanlands, so teir verða tvingaðir til Havnar at arbeiða hjá feløgunum har.

### Sleppa framtíðini fyri løtuvinning

Hinvegin ávarar John Eli Olsen ímóti at skerja møguleikarnar hjá føroyskum handverkarum at arbeiða uttanlands.

– Og serliga lítið dámar honum hetta, tá ið veruliga endamálið við at forða handverkarum at arbeiða uttanlands, ikki er annað enn at útvega byggifeløgum og handverksmeistarum í Havn ein løtuvinning við at útvega teimum arbeiðsmegi, so at teir hava bjóðað upp á arbeiði, teir í veruleikanum ikki hava fólk til.

– Hetta er ein sera hættislig gongd, tí skulu vit hugsa frameftir og vera við í altjóðagerðini, hevur tað avgerðandi týdning, at vit ikki sleppa marknaðinum, vit hava bygd upp uttanlands.

– Verða føroyskir handverkarar uttanlands tiknir heim, bara fyri at røkja áhugamálini hjá byggifeløgum og handverksmeistarum í Havn, er hetta tað sama sum at spæla sær av við stórar framtíðarmøguleikar.

– Eru vit fyrst farnir av tí útlendska marknaðinum, so eru vit burtur í allar ævir, tí tað er vónleyst at koma inn aftur á marknaðin.

– Og eg haldi ikki, at tað er

*Framhald á næstu síðu*